Landssjúkrahúsið




# Sjúklingakunning
# um prostatakanning

## Hví verða kannaður í prostata?

Við hesi kanning sæst, hvussu stórur prostata er, og um prostata er størri enn vanligt. Um so er, ber til at kanna um møgulig illkynjað sjúka er í prostata.

## Hvussu verður kanningin gjørd?

Kanningin verður gjørd við at koyra ein tummilfingratjúkkan skannara inn í gjøgnum endatarmsopningin.
Ígjøgnum skannarin ber til at taka vevsroyndir við eini tunnari nál. Við hesi kanning kanst tú merkja lætta pínu.

## Hvussu leingi tekur kanningin?

Skanningin tekur umleið 10 minuttir, men eitt sindur longri, um læknin ger av eisini at taka vevsroyndir.



## Fyrireiking innan:

Um tú tekur blóðtynnadi heilivág, er neyðugt at gevast at taka tablettir 7 dagar frammanundan kanningini.
Um tú fært tikið vevsroyndir, skal tú taka fyribyrgjandi heilivág móti bruna. Hetta fær tú útflýggjað á ambulatoriinum. Tú skal taka tvær tablettir av Ciproxin 500 mg. Eina tablett áðrenn kanningina og eina 6 tímar aftaná.

*Um tú ikki tolir antibotika, er neyðugt, at tú kunnar læknan um hetta.*






## Aftan á vevsroyndina

Fyrstu dagarnar er ikki óvanligt, at blóð er í landi og skarni. Eisini kanst tú hava brúnlitta sáðvætu, og hetta kann varða í nakrar mánaðir.

Um túført febur ella bløðir illa, er umráðandi, at tú setir teg í samband við urologiska ambulatoriið. Aftan á klokkan 16, eins og leygardagar og sunnudagar, skal tú seta teg í samband við læknavaktina á tlf. 1870.

Um vevsroyndir eru tiknar, fært tú eina nýggja tíð hjá okkum um 4 vikur. Her kunnar læknin teg hvat vevsroyndin vísti.
Vit ráða tær til at hava onkran við tær tá tú kemur at fáa svar uppá kanningina.

Vit ynskja tær góðan bata og um tú hevur spurningar, ert tú væl komin at ringja til okkum.

Vinarliga
Starvsfólkið á
B3, Skurðambulatoriið
Tlf 304599, lokal 5404.
Opið mánadag til fríggjadag frá kl 8-16.

Landssjúkrahúsið

tel 304500, www.ls.fo